# Viljin stendur upp á spæl

*Sumbingar hava nógv at stríðast fyri, meðan klaksvíkingar einki kunnu røkka av tí, teir høvdu vónað*

Tað eru ymiskar fyritreytir, tá eitt tað størsta fótbóltsfelagið í landinum í morgin vitjar eitt tað minsta fótbóltsfelagið í landinum. Sumbingar spæla fyri lívinum í bestu deildini. Tey munnu vera fá, sum undan kappingarbyrjan høvdu roknað við øðrum, enn at Sumba skuldi stríðast í botninum.

KÍ hevur ikki annað enn æruna at spæla fyri. Undan kappingarbyrjan vórðu teir mettir at vera besta boðið upp á FM heitið. Nú er greitt, at KÍ ikki røkkur Europa Cup plássi, og teir røkka heldur ikki Intertoto Cup. Tað kennist sum eitt vónbrot hjá klaksvíkingum. Avbjóðingin á Krossinum í morgin verður, at fáa spælararnar at verða nóg uppsettir.

Tomislav Sivic hevur latið nakrar ungar spælarar snoddað til 1. deild. Hjalgrím Elttør var við frá fyrsta bríksli ímóti B36, og tveir aðrir U–18 landsliðsspælarar, Símun Joensen og Atli Danielsen, komu inn síðsta sunnudag. Í morgin eru Símun Waag Høgnesen, Rógvi Jacobsen og Ove Nysted tøkir aftur. Teir vóru allir leikbannaðir ímóti B36.

*Fortreytirnar eru ymiskar undan dystinum, tí meðan KÍ einki hevur at spæla, kunnu sumbingar langt ífrá kenna seg tryggar í niðurflytingarstríðnum*

### Mortan burturfrá

Í stríðnum fyri framhaldandi atgongd til 1. deild hava sumbingar tvær tær síðstu ferðirnar havt Fróða Mortensen í málinum. Vit skilja, at hann aftur í morgin verður málverji.

Aftur hesa ferð hevur tað verið upp á tal, at Dánial Johan Joensen skuldi koma heim úr Danmark, men í gjár var ógvuliga ivasamt, um hann fer at koma. Hjá sumbingum rakar tað sera meint, at verjuálitið, Mortan úr Hørg, er leikbannaður í morgin.

### KÍ plagar at vinna

Sumba hevur verið í 1. deild í trý ár, og eitt ár hava teir mannað lið saman við vágbingum. Hetta síðsta árið var í 1995. Tá taptu teir 2–1 á heimavølli ímóti KÍ.

Fyrsta árið hjá Sumba í 1. deild var í 1991. Tá vann KÍ 3–1 á Krossinum. Í fyrraárið vann KÍ í 18. umfarinum 5–2 í Sumba, og í fjør var úrslitið 3–2 til KÍ.

JH




# KÍ-spælarar til Noregs

*Tvíburðarnir Rannvá og Ragna Andreasen fara í oktober mánaði til Noregs at royndarvenja*

Tveir av stuðulsspælarunum á kvinnuliðnum hjá KÍ fara eftir hetta kappingarárið til Noregs at royndarvenja.

Hetta skrivar lokalblaðið í Norðoyggjum, Norðlýsið, í gjár.

Tað er felagið Athen Moss, sum spælir í bestu norsku deildini, sum ætlar at hyggja nærri eftir teimum báðum spælarunum.

Rannvá og Ragna fara til Noregs mánadagin 9. oktober, og tær skulu venja við liðnum ta vikuna. Leygardagin spælir felagið ein dyst, og dagin eftir koma Rannvá og Ragna heimaftur.

Venjingin í Noregi fer fram við einum sáttmála fyri eygað.

EK



# Alt er ikki avgjørt

*Hóast tað enn eru seks stig upp til heiðursmerki hjá B36 og NSÍ, so kunnu hesi røkkast, um úrslitini laga seg eftir vild komandi vikurnar*

Jákup Mørk

NSÌ hevur fram um nakað annað verið liðið, sum tosað hevur verið um í seinnu kappingarhálvu.

Eftir at tað í juni mánaði varð tosað um kreppu í Runavík, hevur liðið reist seg, og eitt fyri og annað eftir hava oddaliðini muga givið skarvin yvir móti runavíkingum.

Hesu ferð er talan ikki um ein av FM-biðlunum, tað merkir tó ikki, at runavíkingarnir ætla at taka sær av løttum sunnudagin.

- Vit mugu royna at gera okkara part, og so bara vóna, at B68 ella VB snáva í morgin, sigur Trygvi Mortensen, venjari hjá NSÍ.

Støðan hjá NSÍ er nevnliga vorðin somikið góð nú, at laga hini úrslitini seg, eer møguleiki fyri, at felagið fyri fyrstu ferð í søguni røkkur einum europeiskum plássi á stigatalvuni. Tey bæði seinastu umførini skulu runavíkingarnir royna seg móti Sumba og B71, so á pappírinum skuldu møguleikarnir verið góðir.

Hetta vil Trygvi tó ikki hoyra talan um, men mælir ístaðin til at taka ein dyst í senn.

Til dystin sunnudagin hevur NSÍ venjarin annars allar mans tøkar. Sonni L. Petersen og Christian Høgni Jacobsen høvdu leikbann seinast, meðan Sjúrður Jacobsen var skaddur ta ferðina.

Nú eru teir allir tøkir, so er talan um ein trupulleika hjá Trygva, er hann av tí positiva slagnum.

Tað eru annars 13 ár síðani, at NSÍ vann á B36 í Gundadali, men Trygvi heldur, at teir hava broytt so nógv í ár, at tað ger einki, um ein broyting kemur afturat.

### Æruna at spæla fyri

Stendur tað til B36-leikararnar, so verður tað tó ikki nøkur løtt uppgáva, sum NSÍ fær sunnudagin.

Jákup á Borg, sum tey bæði undanfarnu árini hevur verið toppskjútti í landskappingini, sigur við Sosialin, at tað nú mest av øllum ræður um at fáa ein positivan enda á kappingarárið hjá B36.

- Røkkur hetta so til heiðursmerki, er tað sjálvandi gott, men fyrst og fremst er tað æruni, sum vit spæla fyri.

Av fólki noyðist B36 at verða leikbannaða Mikkjal Thomassen fyri uttan sunnudagin, men í aðrar mátar eru allir mans tøkir, og so er spurningurin, hvussu Piotr Krakowski fer at blanda kortini hesu ferð.

**Støðan, 1. deild menn**

| | | | | | | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | dystir | v | - | j | - | t | | mál | mál | munur | stig |
| 1 | HB | 15 | 10 | - | 3 | - | 2 | | 34 | 17 | 17 | 33 |
| 2 | VB | 15 | 9 | - | 4 | - | 2 | | 31 | 18 | 13 | 31 |
| 3 | B68 | 15 | 10 | - | 0 | - | 5 | | 38 | 26 | 12 | 30 |
| 4 | B36 | 15 | 8 | - | 0 | - | 7 | | 41 | 23 | 18 | 24 |
| 5 | NSÍ | 15 | 7 | - | 3 | - | 5 | | 35 | 22 | 13 | 24 |
| 6 | KÍ | 15 | 7 | - | 2 | - | 6 | | 32 | 20 | 12 | 23 |
| 7 | GÍ | 15 | 6 | - | 2 | - | 7 | | 27 | 31 | -4 | 20 |
| 8 | B71 | 15 | 4 | - | 2 | - | 9 | | 22 | 27 | -5 | 14 |
| 9 | Sumba | 15 | 3 | - | 0 | - | 12 | | 11 | 59 | -48 | 9 |
| 10 | FS Vágar | 15 | 2 | - | 2 | - | 11 | | 15 | 43 | -28 | 8 |




# Kynbótaleiðari á Fiskaaling P/F

Av tí at leiðarin fyri kynbótaarbeiðnum hjá Fiskaaling P/F fer í annað starv, er eitt áhugavert og fjøllbroytt starv leyst at søkja á Fiskaaling P/F.

Viðkomandi, ið settur verður, kemur at hava dagligu ábyrgdina av kynbótaarbeiðnum, og skal skipa og leggja hetta til rættis soleiðis, at arbeiðið verður framt undir tryggum og skipaðum umstøðum, soleiðis at allar neyðugar skrásetingar verða gjørdar og goymdar trygt til seinni nýtslu, í samband við úrvalið. Eisini kemur viðkomandi at hava ábyrgdina av samstarvinum við alistøðirnar, har merktur fiskur burtur úr kynbótaarbeiðnum verður aldur og skrásetingar um vekt, lit, kynsbúning og skap síðan verða gjørdar, tá laksurin verður tikin. Við støði í øllum skrásetingum sum gjørdar eru av hvørjum árgangi, skal kynbótaleiðarin síðan skipa fyri og gera familjuúrvalið.

Tann, ið settur verður, kemur at arbeiða í einum mennandi arbeiðsumhvørvi saman við góðum starvsfeløgum og fær møguleikar at menna seg víðari, við at luttaka á ymsum skeiðum uttanlanda.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum, at tann sum settur verður, hevur útbúgving frá hægri lærustovni og hevur holla vitan innan arvalæru, støðd- og hagfrøði. Umsøkjarar sum hartil hava praktiskar royndir innan alivinnuna og tá serliga frá støðum sum hava bygt sína framleiðslu á endurnýtslu av vatni hava fyrimun.

Hevur tú hug til stórar avbjóðingar, eitt ábyrgdarfult, viðkomandi og mennandi starv innan føroysku alivinnuna, kunnu vit bjóða tær alt hetta, umframt góðar arbeiðsumstøður og møguleika at menna teg víðari.

Starvið verður sett skjótast gjørligt og tann ið settur verður, kemur fyrstu tíðina at samstarva við verandi leiðara, fyri á henda hátt at fáa møguleika at seta seg skjótari inn í starvið. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu, í mun til útbúgving og starvsroyndir.

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast P/F Fiskaaling, Við Áir, FO - 430 Hvalvík, í seinasta lagi 25. sept. 2000. Vilja tygum hava nærri upplýsingar um starvið, kunnu tygum seta tygum í samband við P/F Fiskaaling, Símun Joensen, stjóra, telefon 474747 ella 214747, ella við telduposti: simun.joensen@fiskaaling.fo

**Lýsing av P/f Fiskaaling**

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Felagnum er álagt at standa fyri tí føroyska kynbótaarbeiðnum við laksi og sílum. Endamálið við kynbótaarbeiðnum, er at ala fram ein frískan fisk, sum hevur best møguligar eginleikar, soleiðis at føroyska alivinnan er betur kappingarfør á altjóða marknaðinum. Kynbótaarbeiðið byrjaði í 1991 og er seinastu árini ment, soleiðis at í dag verður valt út fyri allar eginleikar, sum til ber at hava við í kynbótaarbeiði við laksi. Fyrstu 5 árini hava 150 familjur verið tiknar við í kynbótaarbeiðnum, men frá 1999 at rokna er støðin víðari útbygd, soleiðis at til ber at hava 400 familjur við í úrvalinum. Eftir seinastu útbyggingina er føroyska kynbótaarbeiðið fult á hædd við kynbótaarbeiðið, sum verður gjørt í øðrum londum. Umframt at standa fyri kynbótaarbeiðnum er felagnum eisini álagt at menna nýggj fiskasløg til føroysku alivinnuna. Í hesum sambandi hevur felagið seinastu árini arbeitt við eini verkætlan innan aling av toski. Hendan er nú steðgað og felagið er farið í holt við eina verkætlan, sum hevur til endamáls at menna alingina av kalva. Sum liður í kynbótaarbeiðnum framleiðir felagið hartil 2000 - 3000 litur av laksarognum árliga umframt nakað av sílarognum. Samlaði umsetningurin í felagnum seinastu árini hevur verið umleið 25 mill. kr.

**P/F Fiskaaling**
Við Áir • FO-430 Hvalvík



# Mentunarstuðul

**frá mentunarnevnd Tórshavnar býráðs**

2 ferðir um árið, í mars og september, er møguleiki at søkja um stuðul frá mentamálanevndini.

Stuðulin verður veittur einstaklingum og feløgum í kommununi til tiltøk, ið verða hildin at hava týdning fyri mentunarlív kommununnar.

Fyri at fáa stuðul, skal vera sýnt í verki, at álvara er aftan fyri tiltakið.

Grundgevast skal fyri umsóknini, og eigur fíggjarætlan/roknskapur at fylgja við umsóknini, so metast kann um studningstørvin hjá viðkomandi felagi, luttakara ella persóni.

Meir fæst at vita um stuðulin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 315160.

Umsóknir skulu verða Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 9. Oktober 2000. Merk umsóknina “Mentunarstuðul”.

*Tórshavnar kommuna*



## Fá ókeypis ráðgeving áðrenn tú byrjar nýtt virki

Hugsar tú um at byrja við egnum virki? So kannst tú fáa serkøna ráðgeving áðrenn tú byrjar. Við skipanini "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av fyritøku" kannst tú fáa ráðgeving fyri kr. 7.000,- hjá Virkisráðgeving Sp/f sum hjálpir tær í gongd.

- Ráðgevin verður tín samstarvsfelagi, tá ið tú avgerð at byrja við egnari fyritøku
- Tú fær hjálp til at gera eina virkisætlan, ið lýsir fullt út títt hugskot
- Tú fær eisini at vita um so er, at ætlanin ikki tykist burðardygg
- Virkisráðgevin kann eisini vísa til aðrar ráðgevarar, um tað gerst neyðugt

Ynskir tú at vita meira um "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av egnari fyritøku" so ring til TK-stovuna.

**TK-STOVAN**
Niels Finsensgøta 37 • 100 Tórshavn
Tel. 31 73 66 • Fax 31 93 63

Sosialurin - 311820



Søkt verður eftir

## STÝRIMONNUM

Vegna danskt útgerðarfelag verður søkt eftir tveimum royndum og álítandi yvirstýrimonnum til produkttangaskip.

Krøv: Skipsføraraprógv av 1. stigi og GMDSS og annars tey vanligu tíðarkravdu skeið og heilsuprógv, ið siglandi skulu lúka, smbrt. altjóða reglur.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

TORSHIPPING
Box 1252 · 110 Tórshavn



## Bakaralærlingur

**Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hetta áhuga so ring ella skriva til:**

**P/f Frants Restorff
Tórsgøta 13
Postsmoga 41
100 Tórshavn
Tel. 31 10 60**

frants restorff



## Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs

Mánadagin 18. september, klokkan 17 handar Tórshavnar kommuna Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs í **Sjónleikarhúsinum**.

Øll hava atgongd.

Tórshavnar kommuna



## Maður til Havnar

Kom til Havnar og hjálp okkum við at smíða eitt sindur og mála. Frítt uppihald.

SILDAGOYMSLAN Tlf. 312355 (kl. 10–16)



## Útróðrarbátur til sølu

Fiskiloyvi 4A.

Tlf. 254270